# Freistin úti at søkja stjórastarvið á Strandferðsluni

**Í dag, fríggjadagin, er freistin úti at søkja starvið sum stjóri á Strandferðsluni. Higartil hevur Vinnumálaráðið fingið tvær umsøknir til starvið, ið skal setast sum skjótast**

STRANDFERÐSLAN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Freistin at søkja starvið sum stjóri á Strandferðsluni er úti í dag, fríggjadagin. Vinnumálaráðið lýsti fyri einum mánað eftir nýggjum stjóra til stovnin, eftir at Reidar Nónfjall, sum hevur verið stjóri á stovninum seinastu fimm árini, boðaði frá at hann hevði ikki hug at halda fram í starvinum.

Nú freistin at søkja er um at vera úti, hevur Vinnumálaráðið fingið tvær umsøknir til starvið, sigur Arne Poulsen, aðalstjóri í Vinnumálaráðnum. Men ofta koma umsøknirnar ikki fyrr enn í seinastu løtu, so tá avtornar kann talið gerast nakað hægri.

Tann, ið fær starvið sum stjóri á Strandferðsluni, skal hava holla teoretiska útbúgving, leiðsluroyndir frá privata og/ella almenna arbeiðsmarknaðinum, og harumframt skal viðkomandi hava góð samstarvsevnir og mennandi leiðslustíl, sigur Vinnumálaráðið í starvslýsingini. Starvið sum stjóri á Strandferðsluni verður sett »sambært serligari avtalu«.

Arne Poulsen sigur, at Vinnumálaráðið miðar ímóti at nýggi stjórin á Strandferðsluni skal kunna taka við starvinum skjótast gjørligt. Fráfarandi stjórin hevur uppsagnartíð til á nýggjárinum, men hevur biðið um at sleppa úr starvinum fyrr, um tað letur seg gera.


*Reidar Nónfjall fer í næstum úr stjórastarvinum á Strandferðsluni. Freistin at søkja starvið, sum Reidar Nónfjall hevur røkt seinastu fimm árini, er úti í dag, fríggjadagin. Hósdagin hevði Vinnumálaráðið fingið tvær umsøknir til starvið.*

# Almennur fyrilestur á Føroyamálsdeildini

TÍÐINDASKRIV

Mánakvøldið 21. oktober kl. 20.00 heldur Kim Simonsen fyrilestur í Loftsstovuni á Føroyamálsdeildini. Fyrilesturin eitur

Bardagin um føroysku fortíðina – føroysk søgufatan og mentanarsøga millum tjóðarbygging, mytur og postkolonialan vandasjógv. Øll eru vælkomin.

"Nakrar visiónir fyri norðurlendskt samstarv í framtíðini.

Um viðurskifti millum størru londini og útnorðurlendsku útjaðarnar í einum altjóðagjørdum heimi, sæð í sosiologiskum høpi."

Hesa yvirskriftina hevur Kim Simonsen givið fyrilestrinum hjá sær, sum hann fer at halda í Norðurlandahúsinum sunnudagin kl.16.00.

Norrøna Felagið og Norðurlandahúsið skipa fyri.

Um mánaðaskiftið hevur Norðurlandaráðið ársfund í finska høvuðsstaðnum Helsinki. Nógv verður gjørt burturúr í ár, tí Norðurlandaráðið er fimmti ár í ár.

Tí hóskandi júst nú at viðgera okkara lut her í Útnorðri í norðurlendska samstarvinum.

Og Kim Simonsen rópar varskó: – Teir góðu Norðurlandavinirnir er skjótt horvnir, so sum Sven Havsteen-Mikkelsen við sínum tekningum, og Bjarne Nielsen Brovst við bókum um William Heinesen.

Hetta ættarliðið hevði eina sunna modernaða mentafatan, har Útnorður var eins modernað og alt annað, sigur Kim Simonsen. Hann leggur afturat:.

– Í dag skulu vit ansa eftir, at tað norðurlendska ikki endar við at endurskapa agg móti nútíðini, at norðisman sum hugmyndafrøði ikki gerst ein skansi móti metropolum, Evropa og heimsárinum, har vit enda við at verja okkum móti útlendskari mentan.

Vit eiga ikki bara at leggja dent á eldri føroyska mentan (folklorisering), tá vit royna at umboða okkara samleika her í Útnorði, tí so endar henda mentan sum nakað eksotiskt.

Eg eri bangin fyri, at Útnorðurmentanarhúsið á Bryggjuni í Keypmannahavn fer at seta okkum Útnorðurfólk í ein bás, har vit skulu útstillast sum okkurt eksotiskt í føroyskari húgvu, og leggja dent á alt gamalt.

Hetta kann fáa eina øvugta ávirkan, at útlendingar nú fáa »prógv« fyri, at vit hanga føst í fortíðini og at okkum dámar tað, sigur Kim Simonsen.

Fyrilesturin hjá Kim Simonsen verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 20.oktober kl.16.00, og hann er almennur. Eftir fyrilesturin verður kjak um evnið stendur í tíðindaskrivi frá Norrøna Felagnum.




# ítróttur

Nr. 200 • fríggjadagur • 18. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hesum kunnu vit vera errin av

**– Vit vístu heiminum, at vit so sanniliga eisini duga at spæla fótbólt, segði ein errin Henrik Larsen millium annað eftir dystin, har hansara menn høvdu skelkað eitt av størstu fótbóltsstórveldunum í heiminum**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**Hannover:** Hóast hann sjálvandi var bæði fegin og errin um avrikið hjá liði sínum, so glapp eitt lítið »satans« undan varrunum hjá Henrik Larsen, tá hann eftir tíðindafundin við týsku fjølmiðlunum togaði føroysku tíðindafólkini til síðis, so vit í friði og náðum kundu skifta nøkur orð um dystin. ARD, DSF og aðrar stórar týskar støðir vórðu vinarliga biðin um at bíða, tí nú ætlaði hann sær fyrst at tosa við føroysku pressuna.


*– Ert tú ikki uppsettur tá tú møtir Týsklandi, so verður tú tað ongantíð, segði Henrik Larsen millum annað*

### Duga at spæla fótbólt

Spurdur, hvussu tað kendist, at standa við róðrið, nú føroyskur fótbóltur hevði fingið sítt kanska besta úrslit nakrantíð, segði landsliðsvenjarin, at hetta var ikki tað besta.

– So skuldu vit havt javnað til 2-2, men hóast tað ikki eydnaðist, so eri eg ótrúliga errin av leikarunum.

– Vit vístu verðini, at vit eisini duga at spæla fótbólt. Ikki bert verjufótbólt, men eisini fram eftir vøllinum, og at gera tað ímóti Týsklandi er eitt einastandandi flott avrik frá hvørjum einasta leikara á liðnum.

Undan dystinum hevði eitt nú fyrrverandi stórleikarin, Karl Heinz Rumenigge, sagt, at talan mátti verða um ein sigur til týskarar upp á seks til átta mál. Spurdur, hvørt hann hevði nýtt hetta sum ein motivatiónsfaktor hjá liðnum, segði Henrik, at tað hevði hann ikki.

– Soleiðis er tað altíð, tá hasar stóru kanónirnar úttala seg. Eg tók mær so ikki stórvegis av tí, men tað var deiligt at gera orðum hansara fyri skommum. Tað er púrasta víst.

### Málið ein fyrimunur

Tá týska málið kom eftir bert trimum minuttum, vóru tað helst mong, sum óttaðust eitt rættiligt sorl. Soleiðis gekst tó ikki, og spurningurin er kanska, um tað ikki var ein fyrimunur fyri føroyingar, tí hetta kanska doyvdi týska trýstið eitt sindur.

– Tað kann gott vera, at nakað er um tað, men vit skulu nú ikki gloyma, at teir eisini í løtunum eftir málið hava fleiri góðar møguleikar, sum akkurát tað sama kundu givið mál, um tað ikki var fyri Jákup. Hann stóð ein ótrúligan dyst, og í øllum førum tað besta, sum eg havi sæð hann.

– Hinvegin megnaðu spælararnir at reisa seg aftur, og tað hongur nokk saman við tí, sum vit tosaðu um áðrenn dystin. At vit allir skuldu taka hetta sum eina stóra uppliving, sum vit kanska bara fáa einaferð. Allir vóru samdir um, at líkamikið hvussu leikur fór, so skuldu vit stríðast til tað allar seinasta, og tað gjørdu vit so sanniliga eisini.

### Rósti hjálparvenjaranum

Í mun til dystin leygardagin í Kaunas, so var nærum talan um eina kollvelting í føroyska spælinum. Spurdur, hvørt tað var á nøkrum serligum økjum, eitt nú tí sálarliga, at arbeitt hevði verið við leikarunum, segði Henrik Larsen, at sálarligi parturin var minsti trupulleikin.

– Tað nýtist ikki at seta leikararnar upp til ein slíkan dyst. Ert tú ikki uppsettur tá tú møtir Týsklandi, so verður tú tað ongantíð. Hinvegin arbeiddu vit nógv við bæði verjuskipan og uppspæli, og her haldi eg ikki, at eg kann rósa Jógvan Martini nóg mikið. Hann hevur gjørt eitt ótrúliga gott arbeiði hesar dagarnar.

### Fantastiskir áskoðarar

Og áðrenn Henrik Larsen fór víðari til aðrar fjølmiðlar, helt hann, at hann eisini skuldi geva áskoðarunum eina tøkk.

– Eg má leggja afturat, at áskoðararnir so sanniliga eisini stríddust til tað seinasta. Tað var heilt fantastiskt at hoyra, hvussu væl teir stuðlaðu okkum. Hatta var veruliga nakað, sum lyfti liðið, og tað eri eg ótrúliga fegin um, segði Henrik Larsen at enda.

*Føroysku áskoðararnir vóru stóru sigursharrarnir í Hannover, og leingi eftir at týsku áskoðararnir vóru farnir heim, hoyrdust føroysku rópini. Teir fáu týskarar, sum vóru eftir, søgdu mest sum allir tillukku, og tað var uttan iva eitt herðaklapp, sum 12. maður var fegin um*

